ítróttur

Nr. 186 • leygardagur • 28. september 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

GI-B36:

Europa upp á spæl

GÍ og B36 eru liðini, sum kappast um seinasta europeiska plássið, og hetta kann vera mest sum avgjørt eftir dystin sunnudagin

UPPTAKT
Jákup Mørk

Tað er einki at ivast í, hvørjum partarnir tráða eftir, tá GÍ og B36 fara á vøllin í Sarpisgerði sunnudagin. Hóast Toto-plássið neyvan er tað, sum kassameistararnir í feløgunum tráa eftir, so er tað altid ein stór ítróttarlig avbjóðing hjá leikarunum at spæla móti útlendskum liðum, og hetta vilja bæði gøtu- og havnarmenninir sleppa at gera komandi ár.

Undan dystinum er støðan tann, at bæði liðini hava sama stigatal, men tá GÍ vann fyrra innanhýsis dystin í Havn, standa teir seg betri í innanhýsis uppgerðunum, og tí kunnu teir nógv betri liva við einum javnleiki enn B36 kann tað.

Nógv fráfall

Hóast tað soleiðis er líkt til, at báðir partar leggaj nógv fyri sunnudagin, so skerst ikki burtur, at talan er um álvarsligar skerjingar í leikarahópinum til týdningarmikla dystin.

Hjá GÍ eru tað fyrst og fremst teir báðir, Bartal Eliasen og Sámal Joensen, sum saknur verður í. Bartal fekk sítt sætta gula kort í Klaksvík herfyri, og í sama dysti fekk Sámal Joensen ostaskorpuna frá dómaranum, so teir mugu báðir hyggja at dystinum frá síðulinjuni.

Hinvegin hevur GÍ til hendan dystin aftur Hallur Joensen tøkan, eftir at hann annars hevur verið burtur frá við einum keiktum fótliði, og í aðrar mátar tykjast allir leikarar á liðnum at vera 100% til reiðar til týdningarmiklu uppgávuna, sum altso kann tryggja gøtumonnunum 11. europeisku luttøkuna á rað.

Hjá B36 tóktist støðan við leikarunum at vera eitt sindur meira óviss, tá vit høvdu samband við teir hósdagin, men tað er líkt til, at eisini teir verða nakað skerdir sunnudagin. Tað tykist púrasta vist, at Bárður Mortansson ikki verður við, eftir at hann fekk ein skaða í fótliðið undir venjing mikukvøldið, og so er tað eisini óvist, hvussu verður við teimum báðum landsliðsleikarunum, Jákup á Borg og Julian Johnsson.

Jákup fekk skaða í lærkrikan, tá B36 spældi javnt á Eiði seinasta vikuskifti, og Julian hevur ein lítlan fipurskaða at dragast við, og møguliga fara teir báðir at royna seg sunnudagin. Hinvegin telur tað eisini hjá teimum, at landsliðið skal avstað til Litava og Týskland um hálva aðru viku, og júst hendan feðrin er kanska størsta avbjóðingin hjá fótbóltslandsliðnum nakrantið, so tað er lítið at ivast í, at hetta eisini spøkir í tonkunum á leikarunum.

Tað ger europeiska luttøkan hjá felagnum tó eisini, og tað er einki at ivast í, at tá saman um kemur, so fara teir 11, sum verða á vøllinum fyri hvørt liðið at gera sítt ítarsta, soleiðis at talan eisini komandi árið kann verða um europeiska avbjóðing.

Gí vann fyrra dystin á B36 í ár, og tí standa teir seg betri í innanhýsis uppgerðunum, sum væl kunnu gerast avgerandi fyri Toto-plássið

HB-EB/Streymur:

Ein dyst í senn

Hetta eru greiðu boðini úr HB, har teir enn ikki vilja hoyra talan um gullkrónurnar

UPPTAKT
Jákup Mørk

Sum støðan er á stigatalvuni í løtuni, so er HB í royndum og veru bert fýra stig frá meistaraheitinum, og trý av hesum kunnu røkkast, tá teir sunnudagin spæla ímóti EB/Streymi. Gamaní kann HB eisini gerast meistari longu nú, um bæði KÍ og NSÍ seta stig til um vikuskiftið, men tað er so neyvan nakað, sum tey í HB ganga og rokna við. Har er tað fyrst og fremst egnu dystirnir, sum telja, og hesir skulu spælast, áðrenn nøkur heiðursmerki verða handað, eru greiðu boðini.

Einki avgjørt

- Tað sum vit hugsa um, er at vit sjálvir kunnu avgera, hvar gullið skal fara, og tað støðuna royna vit at halda fast um. Enn eru tveir dystir eftir, og fyrr enn hesir eru leiktir, kunnu vit ikki rópa okkum fyri nakað sum helst. Sjálvandi hugsa vit eisini um gullið, men tað hevur verið málið í alt ár, so tað fyllir ikki meira nú, enn tað hevur gjørt.

Somikið greiður er liðskiparin hjá HB, Rúni Nolsøe, tá vit eftir venjingina hóskvøldið spurdu hann, um gullið var nakað, sum teir av álvara vóru farnir at hugsa um.

Um leikararnar sigur Rúni, at har tykjast allir mans at vera tøkir, nú næst seinasta uppgávan stendur fyri framman. Nico Dogaru var leikbannaður seinast, men hann er tøkur aftur, og eingir skaðar av nøkrum slag tykjast gera um seg í løtuni.

Annars hevur nakað av skriving verið í vikuni um, hvussu støðan verður við venjaraspurninginum hjá eitt nú HB til komandi árið, men sambært liðskiparanum er hetta ikki nakað, sum hevur órógva fyrireikingarnar.

- Tað er ikki okkara borð at avgreiða handan spurningin. Tað lata vit nevndina um. Arbeiðið hjá okkum er á vøllinum, og har ætla vit at gera okkara part lídnan, áðrenn vit flyta tankarnar nakra aðra staðni, sigur liðskiparin at enda.

Vilja órógva

Soleiðis tykist tað, sum um hugburðurin til uppgávuna í HB er hin rætti, og í EB/Streymi tykjast tey eisini at ásanna, at her verður talan helst um eina sera trupla uppgávu. Eisini hóast EB/Streymur fyrr í ár vann á HB, tá liðini tókust á Eiði.

Setningurin er tó eisini hesa ferð, at gera sítt til, at stig kunnu fáast burtur úr dystinum, og til dystin hevur EB/Streymur allar mans tøkar. Eisini Christian Carlsson, sum var leikbannaður seinast, og so er spurningurin bara, hvussu Trúgvi Mortensen velur at blanda kortini hjá sær hesaferð, og um hetta verður gjørt við eins hepnari hond, sum tá HB seinast var mótstøðuliðið.

EB/Streymur skelkaði HB, tá teir vunnu fyrra dystin liðanna millum, men hóast hetta, so tykjast teir hava sera trupla uppgávu, tá teir sunnudagin vitja í Gundadali

Skála–TB:

Tvørámenn liva í vónini

TB venjarin heldur, at síðsti partur av NSÍ dystinum vísti, at moralurin er í lagi, og á Skála heldur venjarin, at tað verður neyðugt við væl betri avriki, enn teir vístu ímóti HB

UPPTAKT
Jóannes Hansen

Verður tað TB, sum skal flyta beinleiðis niður í 2. deild, ella verður tað Skála. Tá seytjanda umfarið verður liðugt spælt í morgin, verður hesin spurningurin næstan endaliga svaraður. Tað er heilt ósannlíkt, at TB fer at fáa nakað í síðsta umfarinum á heimavølli ímóti HB, og hjá Skála er møguleikin væl størri at fáa stig á heimavølli ímóti TB í morgin, enn hann verður annan sunnudag, tá Skála skal spæla á Toftum.

Tvørámenn eru niðastir á støðutalvuni, og annar av venjarunum, Jón Johannesen, heldur lítið vera at ivast í, at tað verður neyðugt hjá teimum at fáa øll stigini suður aftur við av Skála.

– Tað stendur illa til, men ikki verri enn at vit framvegis hava møguleika at sleppa undan beinleiðis niðurflytingini. Men so skulu vit vinna á Skála, og tað verður torført. Tað hevur ikki gingið væl, men lagið á spælarunum er gott, og teir hava arbeitt væl í venjingunum. Avrikið ímóti NSÍ síðsta sunnudag vísti, at moralurin er í lagi. Vit fingu trý mál ímóti okkum eftir lítlari løtu. Tí taptu vit, men tað positiva var, at sjálvt um vit vóru aftanfyri 4–0, so hildu spælararnir fram at stríðast, og vit fingu tvey mál.

Hetta sigur Jón Johannesen. Ímóti NSÍ var hann noyddur at taka seg av vøllinum rættuliga tíðliga. Tað var orsaka av einum vøddaskaða. Nú er hann klárur aftur. Tað er Nebosja Urtajl ikki. Hann er darvaður av fótskaða.

Í februar fylti TB 110 ár, og tað var ikki ætlanin, at liðið skuldi flyta niður beinanvegin eftir, at teir vóru fluttir upp. Seinast TB vann FM var í 1987. Tann einasti av tí liðnum, sum er á liðnum, ið nú stríðist fyri at sleppa undan niðurflytingini, er Jón Johannesen:

– Tað er hugaligt at minnast aftur á FM heitini. Men gongdin hjá okkum vísir, hvussu skjótt tað kann vera hvønn vegin. Árið eftir, í 1988, fluttu vit niður. Tað var einki stuttligt, minnist annar av TB venjarunum. Hin TB venjarin, Óli Johannesen, sum er beiggi Jón, kom fyrstu ferð á besta TB liði á sumri í 1988.

Virðingin var ov stór

Síðsta sunnudag var Skála í Gundadali. Tað gekk alt annað enn væl. HB smurdi teir av, og Skála avrikið var avgjørt ikki sannførandi.

– Tað tóktist sum um spælararnir høvdu alt ov stóra virðing fyri HB. At teir beinanvegin fingu mál ímóti sær gjørdi ikki støðuna betur. Vit eru samdir um, at hugburðurin skal vera heilt ein annar ímóti TB, og talan verður sjálvsagt um heilt eina aðra uppgávu, heldur Hans Jákup Andreasen, sum hesar seinastu vikurnar hevur havt ábyrgdina av liðnum hjá Skála.

Á Skála vóna teir, at allir spælararnir verða tøkir í morgin, men talan er um okkurt ivamálið. Serliga er tað týdningarmikli miðvallarin Pauli Hansen, sum er ivasamur. Orsaka av skaða í lærkrikanum hevur hann ikki vant í vikuni, men teir vónaðu, at hann verður førur fyri at spæla. Málverjin Eugen Voda hevur heldur ikki vant orsaka av løsti, men hann verður við.

Verður tað Hans Jákup Andreasen, sum fer at hava ábyrgdina av Skála liðnum komandi ár?

– Avgjørt ikki. Vit tóku hetta uppá okkum nú í heyst. Eftir dystin ímóti B68 verða tað vónandi tríggir dystir eftir. Ein ímóti B68 og so tveir kvalifikatiónsdystir, men so fara teir at finna sær ein nýggjan venjara. Vónandi fær hann eitt 1. deildarlið at venja, ynskir Hans Jákup Andreasen.

Talan verður um sannan botngysara á Skála, tá TB vitjar. Taparin á við mest sum 100% vissu siga farvæl við bestu deildina á hesum sinni

Tølini tala

Tað er bara í dystinum í Vági, at útiliðið sunnudagin hevur ein søguligan fyrimun, um hugt verður at seinastu tíggju árunum. Í Runavík hevur NSÍ seinnu árini havt sera gott tak á grannunum úr B68, og í Gøtu er tað bert komið fyri tvær ferðir seinastu tíggju árini, at B36 hevur fingi nakað við sær heimaftur, men tá hava teir so eisini tikið alt.

EB/Streymur eigur enn til góðar at skora í útidysti móti besta liðnum hjá HB, og á Skála er sjálvandi eingi hagtøl at líta á, tá eftir øllum at døma avgerandi dysturin í botninum er á skránni.

Talan niðanfyri vísir, hvussu tað hevur gingist, tá mótstøðuliðini sunnudagin hava hitst í tilsvarandi dystunum seinastu 10 árini.

- jm

	'01	'00	'99	'98	'97	'96	'95	'94	'93	'92	Í alt	
HB-EB/S	1-0	-	-	-	-	-	-	4-0	-	-	2-0-0	5-0
Skála-TB	-	-	-	-	-	-	-	-	-	-	0-0-0	0-0
NSÍ-B68	1-1	3-0	4-1	4-1	2-1	-	0-5	0-0	-	2-4	4-2-2	16-13
VB-KÍ	1-2	1-0	2-1	0-4	1-0	0-2	1-2	-	0-1	1-1	3-1-5	7-13
GÍ-B36	3-1	1-0	2-1	5-2	0-2	3-0	2-0	2-0	2-1	0-1	8-0-2	20-8

Dystir um vikuskiftið

Fótbóltur
1. deild menn

29.09	HB-EB/S	Dagfinn Olsen
29.09	Skála-TB	Lassin Isaksen
29.09	NSÍ-B68	Suni Johansen
29.09	VB-KÍ	Oddmar Andreasen
29.09	GÍ-B36	Petur Skarðenni

2. deild menn

28.09	B71-VB	Jón Kári Frederiksen
28.09	B36-LÍF	Rúni Gaardbo
28.09	Sumba-NSÍ	Eiler Rasmussen
28.09	ÍF-FSV	Niklas á Líðarenda
28.09	KÍ-HB	Dia Lamhauge

3. deild menn

29.09	Royn-TB	Poul Erik Jacobsen
29.09	FSV-B68	Jan E. Glyvradal
29.09	ÍF-B71	Jan Gardar
29.09	GÍ-B36	Edvard Højgaard

Hondbóltur
1. deild kvinnur

29.09	17.00	Neistin-Kyndil
29.09	15.00	VB-Stjørnan
29.09	14.30	VÍF-Tjaldur

1. deild menn

28.09	16.00	H71-KÍF
29.09	18.30	Neistin-Kyndil

1. deild menn

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 HB	16	11	-	2	-	3	47	17	30	35
2 KÍ	16	10	-	3	-	3	42	20	22	33
3 NSÍ	16	10	-	3	-	3	34	17	17	33
4 GÍ	16	9	-	1	-	6	29	27	2	28
5 B36	16	8	-	4	-	4	47	25	22	28
6 B68	16	6	-	5	-	5	24	24	0	23
7 VB	16	5	-	4	-	7	16	17	-1	19
8 EB/Streymur	16	3	-	3	-	10	18	38	-20	12
9 Skála	16	1	-	4	-	11	12	39	-27	7
10 TB	16	1	-	3	-	12	16	61	-45	6

2. deild menn

	d	v	-	j	-	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 FS V	17	13	-	3	-	1	53	9	44	42
2 B71	17	7	-	4	-	6	28	19	9	25
3 B36	17	6	-	6	-	5	27	29	-2	24
4 ÍF	17	7	-	3	-	7	36	34	2	24
5 KÍ	17	6	-	4	-	7	27	31	-4	22
6 VB	17	7	-	1	-	9	27	44	-17	22
7 LÍF	17	6	-	3	-	8	29	27	2	21
8 Sumba	17	6	-	3	-	8	22	37	-15	21
9 NSÍ	17	6	-	2	-	9	16	33	-17	20
10 HB	17	5	-	3	-	9	29	31	-2	18